# Árinsmeting
# Verkætlan undir Gøtueiði

06.06.2024



## Innihaldsyvirlit

1.0 Samandráttur ... 3
2.0 Almenn lýsing av verkætlanini ... 4
3.0 Tíðarætlan ... 7
4.0 Grundgeving fyri staðseting ... 7
5.0 Kanning hjá Biofar ... 11
5.1 Alduávirkan frá skipum. ... 13
6.0 Djóralív í nærumráðnum ... 14
7.0 Fornminni-Kanningar hjá Søvnum Landsins ... 15
8.0 Plastdálking í sambandi við spreinging og kaibygging. ... 15

<u>Fylgiskjøl</u>

Fylgiskjal 1 - Yvirlitstekning
Fylgiskjal 2 - Biofar - Búlendiskanning
Fylgiskjal 3 – Biofar – 2024_05_Notat um alduávirkan við Kvørnina

## 1.0 Samandráttur

Eysturkommuna og 24.04.2023 P/F hava í longri tíð arbeitt við eini havnaætlan norðan fyri bygdina Undir Gøtueiði.

Útlagda havna- og vinnuøki er deilt sundur í tvey økir. Øki 1 ið er sunnara øki, er uml. 100.000 $m^2$, íroknað sjóøki. Víddin á norðar økinum, t.e. øki 2, er uml. 140.000 $m^2$.
Hendan árinsmetingin skal lýsa árinini fyri verkætlanina á øki 1.




Mynd 1. Yvirlitsmynd av økinum, ið er útlagt til havnar- og íðnaðarøki.

Varðin manglar atløgupláss til síni skip og pláss til atknýtt virksemi í sambandi við skipini. Sum er verður trol og onnur útgerð løgd á goymslu í gomlum grótbrotum og aðrastaðni har pláss er fyri tí.
Eisini manglar Varðin frysti- og goymslupláss, frystigoymslan hjá Varðanum Pelagic á Tvøroyri er ov lítil og av tí saman verður stórur partur av frysta fiskinum, fluttur til goymslur í Europa áðrenn hesin verður seldur. Orska av krøvum frá keyparum, má stórur partur av frysta fiskinum fluttur aftur til Føroyar, áðrenn hann kann seljast víðari.

Eysturkommuna manglar vinnustykki, ið krevja atløgusíðu og kaipláss til vinnuna í kommununi. Verandi kaiøki inni í Norðagøtu kann ikki víðkast.

24.04.2023 P/F er eigari av kaiøkinum við matr. nr. 334b og frystitunnlunum. 24.04.2023 P/F er dótturfelag hjá Varðin P/F.
Eysturkommuna er eigari av kaiøkinum við matr. nr. 334c og av atkomuvegnum.

## 2.0 Almenn lýsing av verkætlanini

24.04.2023 P/F og Eysturkommuna arbeiða við eini havnaætlan norðan fyri bygdina Undir Gøtueiði.
Økið har nýggja kaiin er staðsett, er frámatrikulera í 2 matriklar.
Matrikul 334b er økið hjá 24.04.2023 P/F og matrikul 334c er økið hjá Eysturkommunu.




Mynd 2. Yvirlitsmynd av staðseting á Skálafjørðinum, norðanfyri Undir Gøtueiði og Skipanes.

Lendi millum landsvegin og sjóvarmálan er dyrka lendi og verður í dag brúkt til seyðahald.



Mynd 3. Lendi við matrikul 334b og 334c, norður móti Írakøsti.

Ætlanin er at økið skal brúkast til vanligt havnavirksemi so sum av- og áskipan av fiskavørum, vinnu- og brúksvørum, fiskivinnuvirksemi, vanligt vinnuvirksemi.

Økið er í byggisamtyktini hjá Eysturkommunu útlagt sum havnaøki, t.e. øki D.
Ætlanin er at gera spunskaj til vinnuvirksemi og frystitunnlar við matr. nr. 334b og spunskai til vinnuvirksemi við matr. nr. 334c.
Roknast kann við, at upp til 30 % av víddini verður brúkt til bygningar.
Atkomuvegurin skal bindast í landsvegin við matr. nr. 334b og kemur oman á nýggju kaiina við matr. nr. 334c. Vegurin er uml. 400 m langur.




Mynd 4. Yvirlitsmynd av verkætlanini.

Dýpi á kaiini er millum 12 til 15 m og skulu brúkast uml. 230.000 m$^3$ av gróti at gera kaiina. Grótið fæst á staðnum í sambandi við gerð av frystitunnlum. Tí er ikki neyðugt at flyta grót til økið og ætlanin er heldur ikki at flyta grót av økinum.
Við arbeiðsbyrjan verður neyðugt at fáa grót uttanfrá, til arbeiðsvegin oman til øki har frystitunnlarnir eru staðsettir. Hettar grótið má keypast frá Landsverk á Lambareiði, ella fáast til vega á annan hátt. Uml. 3.000 m$^3$ av gróti skulu koyrast til økið, í sambandi við ger av arbeiðsvegnum.
Kaiin verður gjørd sum spunskai við betonghamara, kaiin verður upplýst av 24 m høgum ljósmastrum. Íbindingin í landsvegin og atkomuvegurin verður upplýstur sum vanligir vegir.

Eysturkommuna og 24.04.2023 P/F eru saman um ætlanina á øki 1.
Eysturkommuna manglar pláss til vinnuverksemi í kommununi og er ætlanin, at kaiin hjá kommununi skal brúkast til vanligt vinnuvirksemi.
Víddin á kaiini hjá Varðanum er 15.000 m$^2$, víddin á kaiini hjá Eysturkommunu er eisini 15.000 m$^2$. Yvirlitstekningin er viðheft sum fylgiskjal 1.




Mynd 5. Prinsipptvørskurður  av kaiini.

Varðin manglar atløgupláss til síni skip og pláss til atknýtt virksemi í sambandi við skipini. Sum er verður trol og onnur útgerð løgd á goymslu í gomlum grótbrotum og aðrastaðni har pláss er fyri tí.
Eisini manglar Varðin frysti- og goymslupláss, frystigoymslan hjá Varðanum Pelagic á Tvøroyri er ov lítil og av tí saman verður stórur partur av frysta fiskinum, fluttur til goymslur í Europa áðrenn hesin verður seldur. Orska av krøvum frá keyparum, má stórur partur av frysta fiskinum fluttur aftur til Føroyar, áðrenn hann kann seljast víðari. Tá verkætlanin er liðug, sleppur Varðin stórt sæð undan at flyta fiskin til goymslur í Europa.

Í fyrsta umfari er ætlani at gera frystitunnlar ið rúma gott 30.000 tons. Møguleiki er fyri at víðka frystigoymsluna, við at spreingja seg longu inn í fjallið. Roknast kann við at samlaða frystimongdin er uml. 120.000 tons árliga. Tí kann roknast við, at uml. 10.000 tons verða flutt til og frá økinum mánaðarliga.




Mynd 6. Prinsipptvørskurður  av frystitunnlum.

Í sambandi við ætlanina, hevur Biofar gjørt kanning av økinum fram við landi og Søvn Landsins gjørt metingar av Írakøsti.

Økið skal hava sjálvstøðuga spillvatnsútleiðing. Vanligt spillvatn skal leiðast í rottangar og síðan út á sjógv.
Spillvatn frá vinnuvirksemi skal botnfella og leiðast gjøgnum oljuútskiljara, har roknast kann við at oljuúrdráttir eru í spillvatninum.
Spillvatnsætlanin fyri økið verður send til góðkenningar hjá Umhvørvisstovuni, tá ið virksemi fyri økið er meira fastlagt.

## 3.0 Tíðarætlan

Væntandi fer byggingin at taka uml. 2-3 ár at gera, frá tí at byrja verður, til kai og frystitunnlar eru klárir at taka í nýtslu.

## 4.0 Grundgeving fyri staðseting

Eysturkommuna hevur rættiliga avmarkaðar møguleikar fyri at víðka um havnarvirksemi í Gøtu. Størri skip kunnu ikki liggja í Gøtu í vánaligum veðrið og økið til íðna o.l. virksemi eru sera avmarkaði.
Landsyninngur er illveðursætt í Gøtuvík, tá ber ikki til at hava skipini hjá Varðanum liggjandi í Norðagøtu.



Mynd 7: Gøtuvík

Skulu atløguviðurskiftini gerast bara nøkunlunda brúkilig í Norðagøtu, er neyðugt at gera innsiglingina smalari, t.d. við einum grótkasti út frá Gøtugjógv, yvir móti verandi grótkasti.

Hóast kommunan valdi at gera ein slíka íløgu, er nyttan avmarka og kann kaiin í Norðagøtu ikki brúkast til ætlaða virksemi har nýggja kaiin Undir Gøtueiði er staðsett, bæði í mun til stødd, óljóð, virksemi, ferðslu, framtíðar útbyggningar o.a.

Skal verandi kai í Norðagøtu kunna brúkast av fleri størri skipum samstundis, skulu munandi útbyggingar og broytingar gerast og verandi pierur flytast longur út á fjørðin.

Nú Eysturoyartunnilin er opnaður, er ferðslan Undir Gørueiði minkað nógv og kemur væntandi at lækka uppaftur meira framyvir. Nýggja kaiin liggur í stóran mun fyri eg sjálvan, uttanfyri bústaðarbygging.

Kaiin kemur at liggja rættuliga sentralt í miðstaðarøkinum, við góðum vegasambandi. Tað tekur uml. 20-25 min at koyra úr Havn, uml. 15 min. úr Klaksvík og 50 minuttir til flogvøllin. Kemur Gøtudalstunnilin, fer hettar at stytta koyritíðina uppaftur meira til økið norðanfyri.

Skálafjørðurin er nátturuhavn og sera væl egnaður til alt virksemi í sambandi við skip og annað virksemi á sjónum.
Eingin havalda kemur inn á fjørðin og streymrakið er avmarkað. Fjørðurin er stórt sæð aldufríður, bert minni aldur frá tá vindur hevur verði í longri tíð, eru á fjørðinum.
Fjørðurin dýpist skjótt út frá fjørðini. Dýpið út fyri ætlaða kaikantin er 12 til 15 m.

Nýggja kaiin liggur fyri seg sjálvan, har frástøðan til nærmast hús Undir Gøtueiði er uml. 970 m.
Valda økið liggur fyri seg sjálvan og ongar ætlanir eru fyri aðrari bygging í økinum uppat og omanfyri kaiina, so sum bústaðar- ella býarbygging. Lendi omanfyri landsvegin verður brúkt til landbúnað. Frystitunnlarnir og verkætlanin annars koma ikki at ávirka sjálvt lendi ella nýtsluna av tí.




Mynd 8. Dýpi fram við ætlaðu kaiini.

Kommunan hevur samskift við SEV um ætlanina. SEV síggja við vælvild til slíkar ætlanir, har tað er gjørligt at samlað sum mest av orkukrevjandi vinnuvirksemi í sama umráði. Hettar fer at effiktivisera útbyggingarnar hjá teimum.

**Skálafjørðurin**
Skálafjørðurin er nátturuhavn og gáttarfjørður. Dýpi á fjørðinum er upp til 70 m, dýpi uttanfyri Tjørnunes er uml. 50 m, við Írakøstasand er dýpi uml. 45 m.
Gáttin er út fyri Saltnes (Saltnesgrynnan) dýpi á grynnuni er uml. 30 m.
Rákið inn eftir fjørðinum er á miðjuni og fram við eystursíðuni, rákið út av fjørðinum er fram við vestursíðuni (Havið).


*Coriolis-kraft á Skálafirði*
Streymmátingar hava váttað, at Skálafjørðurin sum heild er drivin av estuarinum ráki; men at Coriolis-kraftin ávirkar streymin nógv. Hetta sæst á mynd 9.7, sum vísir streymin á fýra ymiskum støðum á 25 metra dýpi, t.v.s. niðri í sjólagnum. Vit síggja eitt týðiligt innrák í miðjuni og á eystaru síðu av fjørðinum, men útrák fram við vestara landinum. Viðhvørt vendir streymurin í styttri tíð, og kanningar hava víst, at hetta hevur samband við vindin. Tá harður vindur liggur inn gjøgnum fjørðin (landsynningur), verður brakkvatnslagið togað við inneftir, og tá hevur sjólagið ofta lyndi til at venda og reka út úr fjørðinum eina tíð.

Mynd 9. Frágreiðing um streymviðurskiftini á fjørðinum, úr “Havið” hjá Boga Hansen.




Mynd 10. Dýpi á fjørðinum

Fjørðurin dýpist rættuliga skjótt út fyri kaiina.

Kanningar gjørdar í 2019 av S.J.H Divers fyri Eysturkommunu, vísa at í meðal er umleið 1 metur av bleytum tilfari á botninum fram við kaiini. Ætlanin er at lata bleyta tilfarið blíva liggjandi og at byggja kaiina omaná á tað.

Útskiftið á fjørðinum er avmarkað orsaka av Saltnesgrynnuni. Fjørðurin fær tilført fekstvatn frá upplandinum uttan um fjørðin. Hesi viðurskifti gera, at fjørðurin hevur eitt 12 m djúpt lag av "Brakkvatni", t.e. ein blanding millum sjógv og fekst vatn.
Smbr. Havið, verður hettar brakkvatnslag í meðal útskift 13 hvønn dag.




Mynd 11. Lýsing av lagdeilingini á fjørðinum

Útskiftingartíðin á fjørðinum, t.e. hvussu ofta vatnið á fjørðinum verður útskift, er lýst í teksinum niðanfyri.

*Útskiftingartíð*

Tað ber til at seta tøl á útskiftingina. Á Skálafirði rúma teir ovastu 30 metrarnir (tað, sum er oman fyri gáttina) tilsamans umleið 330 milliónir rúmmetrar. Í miðal reka umleið 25 milliónir rúmmetrar inn og út úr fjørðinum hvønn dag. Tað tekur tí í miðal 13 (330/25) dagar at skifta teir ovastu 30 metrarnar av Skálafjørðinum út. *Miðalútskiftingartíðin* fyri henda ovasta partin av Skálafirði er sostatt knappar tvær vikur; men sjálvandi liggja summir partar av fjørðinum verri fyri og verða spakuligari skiftir út enn aðrir.

## 5.0 Kanning hjá Biofar

Búlendiskanning hjá Biofar er viðheft hesi Árinsmeting, sí fylgiskjal 2. Niðurstøðan hjá Biofar er endurgivin niðanfyri.

Sum víst á undir kap. 7, er øll verkætlanin sunnanfyri Írarkøst og hava Søvn Landsins ikki nakrar viðmerking til verkætlanina.

**Samanumtikið**

Kanningin hevur staðfest trý búlendir á harðbotni, og fimm búlendir á bleytbotni. Møguliga hevði ein meira umfatandi kanning avdúkað okkurt búlendi afturat á harðbotni. Tó verður ikki mett at tað á økinum finnast búlendir, sum verða mett sjáldsom fyri Føroyar ella nærumhvørvi.

Kanning bleiv gjørd í 2020 av økinum innanfyri tað nú kannaða øki. Staðfestast kann, at økini eru lík og somu búlendir eru umboðaði á báðum økjunum. Sostætt eru búlendini vanlig í nærumhvørvinum eins og tey eru vanlig í í Føroyum.

Nevnda kanning fevndi eisini økið kring Kvørnina beint sunnanvert Tjørnunes. Hetta økið er mett at verða vert at varveita vegna vakurleika, rekreativt virði og tí at einki samsvarandi økið finst í nærumhvørvinum. Kvørnin liggur umleið 280 metrar suður frá syðra markið á ætlaða havnarlagnum.

Við sýnistøku, eru staðfest í alt 112 dýrasløg (1.929 individ). Saman við films- og myndatøku og eygleiðing, er samlaða talið av sløgum omanfyri 150.

Sum heild er økið lutfalsliga einsháttað, og tá hugsað verður um vavið av kanningini, er talið av sløgum ikki stórt, og lívfrøðiliga fjølbroytni er heldur ikki stórt. Av dýrasløgunum, var eitt einstakt gágguslag av ættini *Odostomia*, sum ikki ofta verður staðfest vegna lítlu støddina. Hini eru øll meira og minni vanlig fyri Føroyar.

Einki slag var funnið, sum kann staðfestast sum sjáldsamt ella hótt; einki er á altjóða reyðlistanum hjá IUCN.

Sostætt kann sigast, bæði tá tað kemur til staðfest sløg og búlendir í hesi kanning, er at hesi eru vanligt í nærumhvørvinum og í Føroyum.

**Alternativ staðseting**
Sum víst á í kap. 4 er rættuligt trupult, at útbyggja verandi kaianlegg í Norðagøtu. Skal verandi kai í Norðagøtu útbyggjast, verður neyðugt at taka verandi grótkast burtur og víðka kaiina á strandalinjuni út móti Gøtunesi.



Mynd 12. Verandi kaianlegg í Norðagøtu.

Árin á lendi, umhvørvi og fólk, vil blíva rættuliga umfatandi, bæði undir bygging og tá anleggið vildi verði tikið í nýtslu.
Av tí at havalda liggur inn gjøgnum fjørðin, vil nyttan í at víðka verandi kai í Norðagøtu ikki kunna blíva ein líka góða loysn sum Undir Gøtueiði.

## 5.1 Alduávirkan frá skipum.

Sum staðfest í Búlendiskanningini frá Biofar, er økið uttan um Kvørnina serstakt.
Fyri at staðfesta hvørja ávirkan alda frá skipum hevur á øki við Kvørnina, vóru aldumátingar gjørdar tann 07.05.2024, har Gøtunes sligdi fram við Kvørnini. Vindurin var uml. 5 m/s frá útsynningi, gott veður og sjógvurin var stórt sæð stillur.
Siglingarmynstri tá skip leggja at, er víst á mynd 13. Frástøðan til Kvørnina er uml. 200 m og ferðin er 4 míl, ið er mesta ferðin skip skulu hava tá tey leggja at nýggju kaiini.




Mynd 13. Siglingarmynstur tá skip leggja at kai undir Gøtueiði.

4 royndir vóru gjørdar har Gøtunes silgdi við 4 míla fer inn móti kaiini, síðan við 4 míla fer út efitr fjørðuni og við 6-7 míla fer á sama hátt. Filmupptøkur og skrásetingar vóru gjørdar sunnanfyri Tjørnunes, har reyði sirkulin er vístur á mynd 13. Mynd 14 av Gøtunes er tikin har mátingarnar vóru gjørdar.
Til vinstru á mynd 14 er víst ein 1 m høg træramma, ið var ætlað at skráseta aldur frá Gøtunesi. Tá Gøtunes silgdi 4 míl, kundi eingin alda skrásetast. Við 6-7 míla fer, kundi uml. 10 cm alduskvatl skrásetast.



Mynd 14. Gøtunes siglir fram við Kvørnini og Tjørnunes.

Biofar hevur gjørt notat um skrásetingarnar, sí fylgiskjal 3. Niðurstøðan er endurgivin niðanfyri.

Livni við Kvørnina verður javnt og samt rakt av aldu av náttúrligum ávum, sum tíðum er væl størri enn tær, sum Gøtunes ger í filmsbrotunum.
Eg vildi mett at flestu skipini sigla framvið við eini frástøðu frá Kvørnini uppá uml 200 metrar. Við støði í filmsbrotunum, meti eg ikki at livni í sjóvarmálanum og niðanfyri vatnskorpuna, nervast av skipaferðslu, sum víst verður í filmsbrotunum.

## 6.0 Djóralív í nærumráðnum

Kommunan hevur sett seg í samband við Tjóðsavnið við fyrispurningi um súgdjór í sjónum, fisk og fuglalív. Tjóðsavnið hevur onga upplýsingar í økinum og at tað er einki ið bendir á at økið hevur serligan týdning fyri súgdjór.
Tað er av og á komið fyri, at brugda ella hvalur er komin inn á fjørðin. Men orsaka av Saltnesgrynnuni koma hesi ikki út aftur, mest sannlíkt virkar grynnan sum ein forðing fyri ultraljóðnum hjá hvalunum.
Fyrrv. borgarstjórin fyri Eystur kommunu hevur biði Karl A. Thomsen, fuglaáhugaðan, gjørt eina meting av økinum í mun til fuglalív. Niðanfyri er frágreiðingin frá honum.

*Í sambandi við fyrispurning tín gekk eg mær ein túr 8. Desember 2021 í økinum frá Tjørnunesi og uml. 1,5 km inn móti botninum fyri kanska at finna farvegin eftir onkrum æðu- ella másareiðri, sum kanska kundi hugsast at verið har, men eg fann einki. Tað einasta eg sá til fugl á hesum túri vóru 4 æður (2 blikar og 2 bøgur) á sjónum, eitt villdunnupar í einum dýki og 2 krákur, sum flugu uppyvir. Eg havi varhugan av, at á hasum teininum er rættiliga djúpt fram við landi, og tí er tað heldur einki serligt tilhaldsstað fyri fugl, sum veiðir fram við landi.*
*Skalt tú finna ríkt fuglalív á eystaru síðu á Skálafirði í økinum frá Skipanesi og inn móti botninum í Skálafirði, so skalt tú uml. 3 km inn frá Tjørnunesi, til tað økið vit nevna í Ánunum. Har er útgrunt, sandur og blandingsvatn og eitt veruliga beiti fyri vetrarfugl, sum t.d. grágás, havgás, gjør, ennigula ont og annan antarfugl, sum heldur til har hesa árstíðina.*

*So mín klára niðurstøða er:*
*Nei, á økinum, tú nevnir, niðanfyri Landsvegin frá Tjørnunesi og 1 km inn móti botninum í Skálafirði er einki serligt ella serstakt fuglalív.*

## 7.0 Fornminni-Kanningar hjá Søvnum Landsins

Beint norðanfyri 1. byggistig, er fornminni Írakøstur. 1. byggistig kemur ikki nærri enn 10 m frá fornminninum.
Søvn Landsins hava onga viðmerking til ætlanina, ella krøv til hvat skal gerast við lendi uttan um Írakøst.




Mynd 15. Staðseting av Írakøsti.

## 8.0 Plastdálking í sambandi við spreinging og kaibygging.

Í sambandi spreingiarbeiði eru plastleivdir frá Nonel leiðningum í grótinum. Roknast má við at partur av hesum skolast út úr fylluni, tá hettar verður fylt út á sjogv.
Fyri at forða sum mest fyri hesi dálking, verður sperra løgd út um økið har útvasking er frá fylluni.
KJ Hydraulik hava ment eina skipan í sambandi við ætlaðu útfyllingina á Gomlurætt. Ætlanin er at brúka hesa loysnina sum sperru, meðan útfyllingararbeiði verður gjørt.




Mynd 16. Mynd av plastsperru við innsligingrennu.




Mynd 17. Tvørskurður av flótisperru.

Meðan útfyllingin fer fram, er neyðugt at arbeiðsánarin við jøvnum millumbilum, kannar fjørðin uttan um verkætlanina fyri plastleivdir frá grótfylluni.
Plastleivdir ið er komnar burtur frá flótisperruni, skulu innsamlast og burtrubeinast.

Alternativ kann spreingjast við útgerð, har tað ikki er neyðugt at brúka plasttilfar. Tá er ikki neyðugt at brúka plastsperru.